KRINGVARP
FØROYA

# AVTALA

UM BRÚK AV UPPHAVSRÆTTARLIGA VARDUM VERKUM
SMB. § 31 Í LÓG UM UPPHAVSRÆTT

MILLUM

FJØLRIT
POSTSMOGA 62
FO-110 TÓRSHAVN

OG

KRINGVARP FØROYA
NORÐARI RINGVEGUR 20
FO-100 TÓRSHAVN

KRINGVARP
FØROYA

**FJØLRIT** er góðkendur felagsskapur, sbrt § 40, stk. 1 í lóg um upphavsrætt, og hevur eftir § 42 í lógini loyvi at gera avtalur sbrt. 31 í lógini vegna allar føroyskar rættindahavarar um tey sløg av verkum, sum limafeløgini í Fjølrit umboða.

Limafeløgini í Fjølrit eru: Rithøvundafelagið, Felagið Føroysk Tónaskøld, Føroyskir Yrkisfotografar, Føroysk Bókaforløg, Føroysk Miðlafólk og Føroysk Myndlistafólk. Fjølrit umboðar sostatt við gerð av hesari avtalu allar rættindahavarar innan hesi øki, eisini teir rættindahavarar, sum ikki eru limir í omanfyri nevndu limafeløgum.

**KRINGVARP FØROYA** fær við hesari avtalu, avtaluloyvi, sbrt §42 í lóg um upphavsrætt, og loyvi at senda tilfar, sbrt § 31, stk. 1 í lóg um upphavsrætt. Kringvarp Føroya fær sostatt við hesi avtalu rætt til at senda alt tilfar, sum er útgivið, í Føroyum. Hetta er tó ikki galdandi fyri pall- og filmsverk.

**§ 1: Nýtsluøkið avtalunnar**

Avtalan gevur Kringvarpi Føroya rætt til at senda útgivið tilfar.

Hvør einstakur rættindahavari kann, sbrt §31, stk. 4, seta forboð fyri, at verk, ið hann hevur upphavsrætt til ella hevur ræðisrættindini yvir, verður sent. Slíkt forboð skal skrivliga fráboðast Kringvarpi Føroya.

Sum "tilfar" eftir hesum sáttmála er at skilja øll útgivin bókmentaverk, sum rithøvundar ella týðarar hava skapt. Sum "tilfar" er harumframt at skilja almannakunngjørd verk, sum Kringvarp Føroya hevur framleitt, og sum eru í miðlasavni Kringvarpsins.

At "senda" merkir eftir hesum sáttmála at brúka tilfarið heilt ella partvíst til upplestur ella líknandi framførslu í útvarpinum ella í sjónvarpinum og í hesum sambandi eisini at leggja tað út á heimasíðu Kringvarpsins. Brúk av tilfari á øðrum miðlum enn í útvarpinum og í sjónvarpinum er ikki fevnt av hesari avtaluni.

Eitt verk er "útgivið", tá ið upphavsmaður hevur givið samtykki til, at eintøk av verkinum verður boðið til sølu ella á annan hátt spjatt alment, sbrt. §4, stk. 2 í lóg um upphavsrætt.

Avtalan fevnir ikki um verk, sum ikki eru útgivin, ella verk, sum eru framleidd av Kringvarp Føroya , og sum ikki eru almannakunngjørd. Í slíkum føri má Kringvarp Føroya gera serstaka avtalu við rættindahavaran um loyvi til at senda og um viðurlag.

**§ 2: Avmarkingar**

Tilfar, sum er fevnt av hesari avtalu, kann ikki liggja á heimasíðu Kringvarpsins longri enn ein mánaða eftir, at tað er sent. Skaldsøgur í fleiri pørtum kunnu tó liggja á heimasíðuni í ein mánað eftir, at seinasti partur varð sendur.

KRINGVARP
FØROYA

**§ 3: Endursendingar**

Kringvarp Føroya hevur rætt til at endursenda tilfar tríggjar ferðir innan eina viku eftir fyrstu sending. Fyri slíkar endursendingar verður onki viðurlag goldið. Fyri endursendingar eftir eina viku, verður goldið fult gjald sambært §5 í hesaru avtaluni.

**§ 4: Bókmentaráð**

Skipað verður eitt bókmentaráð, har Rithøvundafelag Føroya velur tveir limir og Kringvarp Føroya tveir limir. Kringvarp Føroya kallar bókmentaráðið saman tríggjar ferðir árliga til at geva Kringvarpi Føroya tilmæli um tilfar at senda eftir hesari avtaluni. Bókmentaráðið ger sjálvt sína stýrisskipan.

Miðað verður eftir, at

a) 50% av tilfarinum, sum verður sent í Kringvarpi Føroya, er uppruna tilfar og 50% umsett tilfar, meðan
b) 60% er nýinnlisið tilfar og 40% endursendingar.

**§ 5: Umsiting, uppgerð og viðurlag**

Kringvarp Føroya sendir hvønn ársfjórðing Fjølrit eina nágreinaða uppgerð yvir tað tilfar, sum er sent í undanfarna ársfjórðingi.

Uppgerðin skal innihalda upplysingar um:
- heiti á verki,
- høvund, týðara ella annan rættindahavara,
- navn á sending,
- dagfesting,
- um talan er um útvarpsleik, prosa ella yrking,
- um talan er um upprunatilfar ella týtt tilfar,
- um talan er um nýinnlisið tilfar ella endursending,
- hvussu nógvar minuttir viðurlag skal latast fyri, og
- hvussu nógv skal gjaldast í viðurlagi.

Uppgerðin skal verða send Fjølrit í seinasta lagi síðst í mánaðin, sum kemur eftir loknan ársfjórðing, tvs. í seinasta lagi ávikavist pr. 30. apríl, pr. 31. juli, 31. pr. oktober og pr. 31. januar.

Í seinasta lagi 14 dagar eftir, at uppgerðin fyriliggur flytir KVF Fjølrit ta samlaðu viðurlagsupphæddina saman við fyrisitingargjaldi, sum er 10% av tí samlaðu viðurlagsupphæddini til Fjølrit á konto í Betri Banka, konto.nr. 9181- 519.730.0

KRINGVARP
FØROYA

Goldið verður fyri senditíð í útvarpinum og sjonvarpinum, og viðurløg fyri sent tilfar eru pr. byrjaðan minutt, hesi:

| | |
|---|---|
| Uppruna føroyskir útvarpsleikir | 100 kr. |
| Týddir útvarpsleikir | 50 kr. |
| Uppruna føroysk prosa | 100 kr. |
| Týdd prosa | 50 kr. |
| Uppruna føroyskar yrkingar | 150 kr. |
| Týddar yrkingar | 75 kr. |

Viðurløgini verða prístalsjavnað árliga pr. 1. januar við brúkaraprístalinum fyri 4. ársfjórðing árið fyri. Brúkaraprístalið fyri 4. ársfjórðing 2017 (118,4) verður nýtt sum grundarlag. Fyrsta prístalsjavning fer fram pr. 1. januar 2019.

Fyri yrkingar verður altíð goldið fyri í minsta lagi tveir minuttir.

Fjølrit hevur skyldu til skjótast gjørligt at rinda rættindahavaranum viðurløg teirra sambært hesi grein. Fjølrit hevur alt samskifti við rættindahavarar og hevur skyldu til á nøktandi hátt at kunnu rættindahavarar um hesa avtaluna og um uppgerðirnar, sum Fjølrit móttekur frá Kringvarpi Føroya.

**§ 6: Gildiskoma o.a.**

Avtalan er galdandi frá 1. januar 2018 og kann av báðum pørtum sigast upp við 3 mánaða freist. Hetta tó í fyrsta lagi til at fara úr gildi 1. januar 2020. Uppgerð smb. § 5 yvir sent tilfar í tíðarskeiðnum frá 1. januar 2018 til 31. desember 2018 verður gjørd í seinasta lagi 31. januar 2019. Eftir hetta verða uppgerðirnar gjørdar pr. ársfjórðing, soleiðis sum tað framgongur av §5 í avtaluni.

Henda avtala er treytað av, at Fjølrit í øllum avtalutíðarskeiðnum er góðkent sum felagsskapur í Føroyum, sbrt. § 40 í lógini um upphavsrætt, og fer úr gildi tann dagin Fjølrit ikki longur er góðkent sum felagsskapur sbrt. §40 í lógini um upphavsrætt.

Fjølrit váttar við undirskriving av hesari avtaluni, at ongi viðkomandi viðurskifti eru broytt viðvíkjandi felagsskapinum ella limafeløgunum, síðani Mentamálaráðið góðkendi Fjølrit sbrt §40 í lóg um upphavsrætt í 2014.

Fjølrit hevur skyldu til alt fyri at boða Kringvarpi Føroyar frá avgerandi broytingum viðvíkjandi felagsskapinum ella limafeløgunum, umframt møguligum broytingum viðvíkjandi góðkenningini hjá Mentamálaráðnum av Fjølrit sum felagsskapur sbrt. §40 í lóg um upphavsrætt.

Tórshavn 22/1 - 2019

FJØLRIT: Atli K. Petersen, formaður

Tórshavn 22/1 - 2019

KRINGVARP FØROYA: Ivan Niclasen, stjóri